# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Randi kortini til Íslands

**Havnargentan, sum hevur vart KÍ-málið seinnu árini, fer nú til Íslands at royna seg**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Umframt sessin í KÍ-málinum hevur Randi eisini í fleiri ár verið fastur partur av føroyska kvinnulandsliðnum, og fleiri ferðir er hon kosin sum ársins málverji í føroysku kappingini.

Tað varð hon eisini í fjør, og tá kundi hon staðfesta, at hennara vón avgjørt var at sleppa at royna fótbóltsevnini uttanlands. Ikki minst, tí íslendska Valur longu var frammi við einum fyrispurningi. Hetta eftir at felagið hevði spælt móti KÍ í UEFA Cup-kappngini fyri kvinnur.

Randi var eisini og vandi við Vali longu í oktober, men hóast íslendska felagið fegið vildið hava Randi í hópin, so var tilboðið, sum tey komu við, ikki nóg gott.

Nú er eftir øllum at døma vent í holuni. Randi fór í gjár til Íslands, og longu um vikuskiftið kann hon vera partur av liðnum hjá Vali.



*Eftir øllum at døma kom Valur knappliga við einum betraðum tilboði, og í gjár setti Randi S. Wardum so kósina móti Íslandi*

## Dystaryvirlit

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 25.04 | Víkingur-NSÍ | Eiler Rasmussen |
| 27.04 | ÍF-KÍ | Ransin Djurhuus |
| 27.04 | B36-EB/S | Petur Reinert |
| 27.04 | B71-Skála | Rúni Gaardbo |
| 27.04 | B68-HB | Jens P. Brattalíð |

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 26.04 | AB-Víkingur | Høgni Hansen |
| 26.04 | TB-07 Vestur | Jens Petur Brattalíð |
| 26.04 | KÍ-NSÍ | Georg Rasmussen |
| 26.04 | B68-VB/S | Jón K. Í Brekkuni |
| 26.04 | EB/S-HB | Birgir Sondum |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 27.04 | AB-B36 | Rói Jacobsen |
| 27.04 | MB-ÍF | Poul Poulsen |
| 27.04 | Skála-Víkingur | Ørvar Jacobsen |
| 27.04 | TB-Fram Royn | |
| 27.04 | 07 Vestur-KÍ | Valdimar á Løgmansbø |

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 27.04 | Víkingur-VB/S | Elsa Andreasen |
| 27.04 | AB-B36 | Gunnar Eysturoy |
| 27.04 | Skála-KÍ | Ørvar Jacobsen |

# Vinnarin fær minni fyrimun

**Ein av broytingunum, sum varð samtykt á aðalfundinum hjá RSF, er, at vinnandi báturin nú bert fær eitt stig meira enn næsti báturin**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um fleiri størri og smærri broytingar, sum vórðu framdar, tá Róðrarsambandið hevði aðalfund seinasta vikuskiftið.

Sum tað framgongur av yvirskriftini, so er ein av hesum broytingum, at vinnarin av róðri nú bert fær eitt stig meira enn tvey'arin fyri sigurin. Soleiðis verða tað nú seks bátar, sum fáa stig fyri róðurin, eins og munurin upp til fremsta bátin í nógvum førum verður styttri, tá stigini verða tald saman.

### Lættari til ólavsøku

Hinar sjey broytingarnar, sum vórðu samtyktar, tykjast eisini allar hava til endamáls at betra um karmarnar hjá kapproðrinum og at gera róðrarnar javnari, meira spennandi og meira áskoðaravinarligar.

Eitt nú verður tað nú staðfest, at eftir at bátur er góðkendur av RSF, er als ikki loyvt at broyta hann. Eitt nú við at smalka ella skera í bekkir, soleiðis sum fleiri hava gjørt fyri at spara vekt.

Eisini eru lógirnar broyttar, soleiðis at genta væl kann vera róðurskvinna á dreingjabáti og øvut.

Dagfestingin, sum verður nýtt til aldursbýtið av rógvarum, verður nú 31. Januar ístaðan fyri 1. mai, og róðrarøkini skulu verða vinkulrøtt.

Størstu ítøkiligu broytingarnar við sjálvum róðrinum er helst skipanin við gulum kortum. Har verður tað so, at hevur bátur eina ferð í kappróðrarárinum fingið gult kort, verður hetta hangandi. Tað vil siga, at tjóvstartar sami bátur aftur í róðrarárinum, fær hann beinleiðis reytt kort. Og tá missur báturin tvey stig, tá róðurin er av hendan dagin. Og kravið til dómarar verður eisini hert, soleiðis at hesir nú skulu geva skrivliga frágreiðing, tá kort verða givin.

Og so tað, at kravið fyri at taka lut á ólavsøku nú verður linkað. Nú er tað nóg mikið, um bátar hava tikið lut í tveimum róðrum á árinum, um teir eisini skulu sleppa at taka lut á ólavsøku.




*Tjóvstartar skulu nú revsast harðari. Hevur bátur tjóvstartað eina ferð í róðrarárinum, ber næsti tjóvstarturin alt fyri eitt revsing við sær*